

## P/F Fiskaaling søkir granskara

til verkætlan innan aling á opnum havi

Fiskaaling er farið í gongd við verkætlan innan **Aling á opnum havi.** Verkætlanin er partur av átakinum nýggj aliøki í vakstrarpakkanum hjá Vinnumálaráðnum (www.vmr.fo). Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara til mátiarbeiði, teldumodelering og dimensioneringsarbeiði.

**Ynskiligir førleikar**

- viðkomandi útbúgving, verkfrøðingur ella líknandi
- royndir frá teldumodelering, serliga FEA-modelering
- royndir við fysiskari modelering og signal analysu
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og Náttúruvísindadeildini umframt at arbeitt verður saman við granskarum úti í heimi.

Høvuðsaktiviteturin verður at gera model arbeiði í samband við at útgerð til aling á opnum havi skal mennast, og at taka lut í mátiarbeiðinum í hesum sambandi. Model arbeiði umfatar FEA modelering av rørslum í samband við streym- og alduávirkan umframt design og dimensionering av fortoyningum, ringum og nótum. Harafturat skal støddarskalerað model gerast og roynast í royndarbrunni. Neyðug upplæring verður veitt til tann partin av arbeiðinum har umsøkjarin ikki hevur førleikar.

Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi umframt at partar av verkætlanini kunnu innganga í PhD-útbúgving.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tel 214787 ella Kristian Petersen á tel 548180.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir, FO-430 Hvalvík

ella
fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 7. mai 2010. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Fiskaaling**
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er 25, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo




## Ert tú góður við tíni húsdjór?

**So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er kvalitetsfóður, framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið er framleitt úr fiski og hønsnarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.






| SPECIAL (20 kg) | SØCLA (20 kg) | KETTUFÓÐUR (15 kg) |
|---|---|---|
| Fyri posan **kr. 450,-** | Fyri posan **kr. 540,-** | Fyri posan **kr. 390,-** |

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Tel. 21 19 96 Ókeypis útkoyring í Havn

